


## B68 heldur 40 ára veitslu

Í ár eru 40 ár liðin síðani Tofta Ítróttarfelag, B68, varð sett á stovn. Í hesum sambandi heldur felagið rimmar føðingardagsveitslu leygardagin, sum eisini er dagurin, har seinasta umfarið í Formula-deildini verður leikt. Frammundan kappingini varð liðið hjá toftamonnum mett sum ein av niðurflytingarkandidatunum, og tá fyrra helvt av kappingini var av, sá heldur ikki serliga gott út. Men B68 er komið sera væl við í seinnu helvt, liggur á einum 6. plássi og hevur fyri langari tíð síðani tryggjað sær framhaldandi luttøku í Formula-deildini. Eisini næstbesta liðið hevur yvirlivað í 1. Deild, so nógv er at hátíðarhalda hjá toftafólki. Sagt verður av Toftum, at nógv spennandi undirhald er á skránni undir borðhaldinum, sum verður í nýggju og snotiligu fimleikarhøllini í Tofta skúla, og seinni er dansur við X-Rays á Svangaskarði. Atgongumerki kunnu keypast í Kioskini við Toftagjógv, hjá Pidda og á Svangaskarði. Seinasta freist er týsdagin 21. oktober.

# Vatnflóð í Havn

**Fyrrapartin í dag varð vatnstandurin somikið høgur, at tað fleyt yvir í Vágsbotni og á Kongabrúnni í Havn. Fleiri bilar stóðu parkeraðir í flóðini og í klædnahandlinum Kallkyn fleyt sjógvurin inn**

ILLVEÐUR

*Rógvi Nybo*
*rogvi@sosialurin.fo*
*Myndir: Jens Kristian Vang*

Ringt veður hevur verið um vikuskiftið, og serliga ringt hevur tað verið sunnudagin, í nátt og fyrrapartin í dag. Eitt djúpt lágtrýst er omanyvir okkum, og er hann sunnan í ættini í dag. Tá liggur vindurin inn á Havnina, og sjógvurin verður trýstur inn. Saman við at tað hevur verið sera nógv avfall í dag og at flóð er, gjørdist trýstið inn á Havnina einu løtuna somikið stórt, at tað fleyt yvir bryggjukantin í støðum.

Á Kongabrúgv vóru helvtin av parkeringsplássunum undir sjógvi, og um hugsningur skuldi vera at koma turrskøddur í bilin, var neyðugt við stivlum.

Tinganes lá eisini mestsum avskorið frá Havnini, og fyri at koma út í Tinganes var neyðugt at ganga eftir Reyn, tí eftir vegnum var ikki gangandi. Eisini her stóðu fleiri bilar parkeraðir í sjógvi

Í Vágsbotni var eisini sera nógvur sjógvur, og somikið nógvur sjógvur var, at tað fleyt inn í klædnahandilin Kallkyn. Hetta var orsakað av at ein rist er inni í handilinum, ið er bundin í sama system sum ein rist, ið liggur beint uttanfyri handilin, og í teirri ristini fleyt yvir, tí at hon liggur lægri enn bryggjukanturin.

Tórshavnar Kommuna var á staðnum, men søgdu seg onga ábyrgd hava á økinum, tí at tað eru húsini, ið liggja ov lágt. Men samstundis hevur kommunan fyri kortum, í samband við bygginginа av sølutorginum í Vágsbotni, lækkað bryggjukantin nakað, og var hetta helst viðvirkandi til at so nógvur sjógvur floymdi inn í handilin.

Til tíðir fleyt somikið yvir í Vágsbotni, at Nólsoyar Páll stóð í sjógvi.



Rokilsi stóð frá, tá bilar koyrdu gjøgnum sjógvin



*P-loyvi nr. 4 var ikki nógv vert í dag...*



*Á Kongabrúnni fleyt eisini tvørturum vegin*



*...tí vegurin út í Tinganes var allur undir í sjógvi*



*Nøkur hildu tað verða stuttligt at vassa...*



*...meðan onnur noyddist til arbeiðis í stivlum*

